## Lestrarstevna á Rex

Fríggjakvøldið klokkan 19 skipar MFS fyri einum kjakkvøldi. Rex verður karmur um árligu lestrarstevnuna, og á skránni verða framløgur við Norðuratlantsbólkinum og umboðum úr andstøðuni og samgonguni. Evnið er útbúgvingarpolitikkurin í Føroyum. Tónleikur og skemt verður eisini. Øll eru vælkomin, heilsa tey av Res og siga, at tað er ókeypis atgongd – og tey í MFS vóna at fáa eitt gott og gagnligt kjak.

## Løgmaður skrivar Gerhardi svar

**Løgmaður situr og orðar eitt skriv, ið skal vera svar til Gerhard Lognberg, ið hevur kravt løgman eftir svari um lagnuna hjá Sandoyartunnlinum innan klokkan 15.00 í dag**

SANDOYARTUNNIL

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í dag situr Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og orðar eitt skriv til partamann sín, Gerhard Lognberg.

Gerhard Lognberg hevur sent løgmanni kravboð, har hann vil hava greitt at vita, um Sandoyartunnilin verður gjørdur og nær, og hvørt hann verður gjørdur áðrenn Eysturoyartunnilin.

Um so er, og svarið er í tráð við hesi ynskini hjá Gerhardi Lognberg, so sigur Gerhard seg framvegis stuðla samgonguni.

Hann vil hava svar innan mikudag klokkan 15:00.

Løgmaður sigur, at Gerhard Lognberg fær svarið í dag, og áðrenn Gerhard hevur fingið sítt svar, verður innihaldið ikki avdúkað.

### Róligur løgmaður

Spurdur, um tað er sum tað skal, at ein tingmaður soleiðis setir kravboð, og at løgmaður gongur hesum á møti við at halda tíðarfreistina, sigur løgmaður, at hetta metir hann ikki sum ein trupulleika.

- Tað gongur nokk!, Eg havi nógv at gera í løtuni og arbeiði undir trýsti, so eg kleri nokk at svara Gerhardi eisini, um so onkur annar bara má bíða eina løtu, sigur løgmaður.

Hann heldur ikki, at hann nú verður dikteraður av tingmanni, ið hevur sett kravboð við tíðarfreist.

- Tað er av størsta týdningi at fáa avklárði viðurskiftir, og Gerhard fær sítt svar innan klokkan 15:00, sigur løgmaður.



*Mikudagin varð málningur av Heðin Mortensen avdúkaður í Listaskálanum í Havn. Edward Fuglø hevur málað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Málningur av Heðini avdúkaður

**Í dag varð málningur av kendum havnarmanni avdúkaður í Listaskálanum í Havn. Málingurin var av Heðini Mortensen, borgarstjóra í Havn. Edward Fuglø hevur málað málningin**

MYND

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Spenningurin var stórur í Listaskálanum klokkan 9:30 í morgun, tí boðað varð frá, at málningur av kendum havnarmanni fór at verða avdúkaður, og at viðkomandi bleiv til staðar, eins og listamaðurin Edward Fuglø.

Tá løtan nærkaðist, at málningurin skuldi avdúkast, vísti Helgi Fossadal, stjóri í Listaskálanum, at siga, at borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, kom at avdúka málningin.

### Fegin Hegin

Tá borgarstjórin í Havn avdúkaði málningin vísti tað seg, at tað var júst Heðin Mortensen, ið var avmyndaður á málninginum.

Heðin Mortensen fegnaðist um úrslitið, og metti listamannin vera komnan væl frá myndini.

Heðin Mortensen segði, at tað er siður í Tórshavnar Býráð, at málningur verður málaður av borgarstjórunum, og hesin var so ein í røðini.

Síðani 1909 hava 18 býráðsformenn verið, 118 býráðslimir, harav 11 hava verið kvinnur og ein kvinnuligur borgarstjóri hevur verið í Havn, vísti Heðin at siga.

Heðin metti, at onnur áttu at døma um myndina, men sjálvur fjaldi hann ikki, at hann var væl foreintur við myndina.

### Modernaði politikarin

Listamaðurin Edward Fuglø segði, at hann hevur málað nakrar andlitsmyndir, ið vóru av Bíbliutýðarunum Dahl, Danielsen, og Viderø, og var hetta til frímerkir.

Listamaðurin segði seg við myndini av borgarstjóranum í Havn, hava roynt gera naturalistiskan málning, ið fangaði dynamiska persónin og modernaða politikaran.

Edward Fuglø hevur sjálvur á málninginum sett Heðin í ein av kendu „eggstólunum“, ið er grønur. Um litirnar í bakgrundini, tað grøna og hvíta, segði Edward, at Heðin eisini er kendur frá ítróttinum, og at tí eru litirnir viðkomandi. Persónurin situr meira á skák og ikki miðskeiðis í myndini, og skal hetta fáa ferð á myndina.

Edward hevur nýtt á leið fýra mánaðir til málningin, oh hann hevur havt fríar teymar.

Tórshavnar Býráð hevur bílagt málningin, og Edward Fuglø segði seg hava lagt dent á at mála eina mynd av einum borgarstjóra, og ikki ein privatmann.